FØROYA REIÐARAFELAG

Tórshavn, 14. november 2023

Hoyringarskriv um yvirtøku av málsøkinum sjórættur

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið hevur sent uppskot til broyting í løgtingslóg um ræði á málum á málsøkjum, sum hevur við sær, at málsøkið sjórættur verður yvirtikið sum føroyskt sermál á sumri 2025.

Føroya Reiðarafelag hevur ongar ítøkiligar viðmerkingar til lógaruppskotið. Tó verður staðiliga mælt til, at henda yvirtøka verða framd á slíkan hátt, at virksemið hjá føroyskum fiskiskipum ikki verður nervað á nakran hátt, og at teirra virksemið heldur áfram ótarnað eftir eina yvirtøku.

Málsøkið sjórættur er eitt umfatandi og torgreitt øki, sum hevur stóran grundleggjandi týdning fyri virksemið hjá fiskiskipum, og tí er hetta ein yvirtøka, ið má fyrireikast væl, og fremjast á skynsaman hátt.

Viðmerkingarnar siga, at miðað verður eftir, at sjólógin, sum er galdandi í Føroyum, verður dagførd í sambandi við yvirtøkuna, so at lógarverkið er ajour í mun til galdandi altjóða krøv í 2025. Umráðandi er, at hesar broytingar verða fyrireikaðar væl, og broytingarnar verða sendar í hoyring í góðari tíð.

Viðmerkingarnar siga eisini, at Uttanríkis- og Vinnumálaráðið fer at lýsa hetta málsøkið meira nágreiniligt saman við føroyskum og donskum myndugleikum og viðkomandi privatum pørtum. Umráðandi er, at Føroya Reiðarafelag er partur av teimum, sum fáa møguleika at vera við í hesum arbeiði.

Vinarliga,

Stefan í Skorini, stjóri

Boks 361 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 73 99 12 • Teldupostur: stefan@industry.fo